# Vinnið eina ferð til Danmarkar!

## Sendið okkum tykkara teldupostbústað og verið við í lutakastinum um eina ferð til Danmarkar.

Hjá Posta Stamps ynskja vit at bøta um samskiftið við viðskiftafólk okkara, og í hesum sambandi hava vit m.a. ætlanir um at geva út eitt teldutøkt tíðindabræv, sum verður sent við telduposti til øll viðskiftafólk, ið ynskja hetta.

Okkara ynski er, at upplýsingarnir um viðskiftafólk okkara eru so dagførdir sum gjørligt, og fyri at hetta skal eydnast nýtist okkum tína hjálp.

Ein pappírslepi er hjálagdur hesum blaði. Vinaliga skrivað í teigarnar, tað sum biðið verður um, og send okkum lepan aftur. Tá vit hava fingið lepan við upplýsingum á og loyvið til at senda tær tíðindi við telduposti, ert tú við í lutakastinum um eina ferð til Danmarkar.

Somuleiðis ber til at senda ein teldupost til stamps@posta.fo við upplýsingunum og tekstinum "Vinn eina ferð". Harvið loyvir tú okkum at senda tíðindi til tín teldupostbústað.

Lutakastið fer fram í januar 2010.

Vit vóna at fáa nógv aftursvar og takka frammanundan fyri luttøkuna!

Posta Stamps
Óðinshædd 2
FO-100 Tórshavn
Føroyar

Tel. +298 346200
Fax +298 346201
stamps@posta.fo
www.stamps.fo

Snið og uppsetan: Posta Stamps/Sendistovan - Prentsmiðja: TrykTeam, Danmark




ISSN 1603-0036

**Postverk Føroya : Posta**

**Útgáva jólini 2009**

**Ársins frímerki 2008 funnið**

Posta

# Vælkomin til okkara nýggja samleika:

# Vælkomin til Posta

Á hesum síðum verður greitt frá sjónliga samleikanum hjá Posta.

### Frá skitsu til úrslit

Búmerkið og samleikin hjá Posta eru úrslitið av nógvum skitsum, millumrokningum og kladdum.

### Um búmerkið

Búmerkið hjá Posta myndar við fyrsta eygnabrá tveir pílar, sum fara hvør sín veg. Hetta er ímyndin av virkseminum hjá Posta, nevniliga logistikkur, ferð og flutningur. Hyggur tú nærri, mynda pílarnir síðurnar á tveimum pakkum. Pakkarnir eru fysiska ímyndin av virkseminum og vøruni, sum Posta handfer.

Pakkarnir eru samantvinnaðir. Kanska er hetta sami pakki, ið sæst á ferð, áðrenn og eftir handanina. Stendur tú eitt sindur frá, hómast eitt »P« í forminum. Hetta er ein av orsøkunum til, at búmerkið vendir, sum tað ger.

Pílarnir ímynda eisini tað, ið kemur og fer, gevara og móttakara, skjótleika ... Eisini ber til at síggja pílarnar sum tvey opin brøv ella kort.





### Pílar og kassar

Ferð, flutningur, pakkar og kassar vóru sentral í tilgongdini at sniðgeva búmerkið. Byrjað varð við tveimum høvuðslutum: Pílum og kassum. Tað var ikki fyrr enn pílarnir gjørdust kassar, og



# Postverk Føroya : Posta

kassarnir gjørdust pílar, at búmerkið hjá Posta dagaði fram.

At enda gjørdist búmerkið til tveir samantvinnaðar kassar, har ljós og skuggi á síðunum tekna pílarnar. Kassarnir vórðu teknaðir í 3D fyri at fáa rætta perspektivið.

### Litir

Posta hevur tveir høvuðslitir: blátt og olivengrønt.

Blái liturin er varðveittur frá Postverki Føroya, tann grøni er nýggjur og er komin við Posta. Við hesum er lagt upp til, at akfør, postkassar og annað, ið hevur verið blátt, sleppur at verða verandi blátt. Blái liturin er hin sami, sum Postverk Føroya hevur nýtt í eitt mannaminni. Við at halda fast í litinum vísa vit virðing fyri tí farna og teimum dygdum, sum Posta ber við sær frá Postverkinum.

Vanliga sigst, at blátt ímyndar sannleika, leking, stabilitet, frið, samljóð, vísdóm, álit, sjálvsálit, trygd og trúfesti. Heimlig tulking: Himmal og hav.

Olivengrønt ímyndar vanliga frið, náttúru, fruktbæri, stabilitet og framgongd. Heimlig tulking: Gras og náttúra.

### Okkara virði

Um Posta skuldi vera lív lagað, máttu munagóðar broytingar gerast í fyritøkuni. Í januar 2008 fóru vit tí undir *»verkætlan 180 stig,«* har høvuðsendamálið var at endurskoða bygnaðin og mannagongdir, fyri síðan at finna røttu loysnina fyri postútbering og avgreiðslu til føroyska samfelagið.

Høvuðsuppgávan hjá Posta er at tæna føroyska samfelagnum við flutningi, serliga av brøvum og pakkum. Kundin skal kenna, at talan er um ómakaleysa tænastu, har alt gongur væl í hond.

Við millum annað hesum í huga varð hugt neyvari at virðunum hjá fyritøkuni, eitt nú atferð, samskifti og mannagongdum. Tá ið vit samanbóru tey við málini hjá Posta, gjørdist greitt, at vit máttu endurtulka tey og arbeiða meira við teimum.

## Okkara mál

- Tænastustigið skal hækkast.
- Vit skulu vera tøk 24 tímar um døgnið, 7 dagar um vikuna.
- Raksturin skal geva yvirskot innan 3 ár.
- Nøgdsemið millum kundar og starvsfólk skal betrast.

# Virðing, vilji og víðskygni

Úrslitið varð, at vit raðfestu virðini »virðing, víðskygni og vilji.«

Virðing merkir fyri Posta millum annað, at vit hava virðing fyri øllum kundum, samstarvsfeløgum og starvsfeløgum, eins og vit hava virðing fyri okkara fyritøku og teimum uppgávum, vit skulu greiða. Vit vísa okkara virðing við at vera álítandi og reiðilig í allari atferð.

Víðskygni merkir fyri Posta, at vit eru ein nýskapandi fyritøka, sum er opin fyri nýggjum møguleikum, ið kunnu gagna kundum og tænastu okkara. Nýskapandi merkir at síggja út um karmarnar, at royna nýggjar leiðir, at vera opin fyri broytingum, at skapa nýggj handilssambond og at betra um tey verandi.

Vilji merkir, at Posta vil vera best, og at fyritøkan ikki fellur í fátt, tá ið hon møtir forðingum.

Posta vil røkka sínum málum og vil liva upp til sína missión og visjón.



# Vakrasta frímerki 2008




1 2 3

## Vakrasta frímerkið 2008 funnið

Frímerkjasavnarar kring allan heim hava atkvøtt millum føroysku frímerkini, ið vórðu givin út í 2008 og úrslitið gjørdist hetta:

Nr. 1 gjørdist smáarkið "Íbygd Støð", FO 628-29, sum avmyndar ávikavist Álvheygg og Klovningastein. Anker Eli Petersen hevur lagt til rættis.

Nr. 2 gjørdist frímerkið "Tinganes", FO 627, ið avmyndar gomlu húsini í Tinganesi. Anker Eli Petersen hevur tikið myndina.

Nr. 3 gjørdist "Mýrisóljan" tjóðarblóma okkara, FO 638. Teknað hevur Edward Fuglø.

Hepnu vinnararnir eru:

1) Joseph Toubon
6671 Bovigny
Belgia

2) Mr. Kocielkowski
Stockay
Belgia

3) Leonard Edelstein
Henderson NV
USA

Frá vinstru: jólakort, jólaprýði, jólamerkini, ársmappa og árbók 2009
















# Jólini 2009



## Jólamerki

Anker Eli Petersen hevur teknað ársins jólamerki, og í ár er evnið kendi føroyski jólasangurin *"Eg eri jólamaðurin"*. Anker Eli hevur teknað 30 ymiskar myndir, sum allar hava støði í jólasanginum.

Avlopið av jólamerkjasøluni fer sum vanligt til Jólamerkjagrunnin, ið hevur til endamáls at stuðla tiltøkum fyri børn og ung í Føroyum.
Jólamerkjaarkið kostar 30,00 kr

## Ársmappa

Ársmappan verður givin út í november. Hon er 235 x 202 mm til støddar, og í henni eru øll frímerkini og smáørkini, ið eru givin út í ár. Hefti og postgjaldsmerki eru ikki við í ársmappuni, sum verður seld fyri áljóðandi virði.
Ársmappan kostar 292,00 kr

## Árbók

Árbókin lýsir við greinum og vøkrum myndum allar ársins frímerkjaútgávur. Øll ársins frímerki og smáørk eru sett í lummar í árbókini, sum er A4 til støddar.

Postgjaldsmerkini eru ikki við í bókini. Bókin fæst í tveimum útgávum: donsk/føroysk og ensk/týsk.
Árbókin kostar 330,00 kr.

## Jólaprýði

Nýggja røðin av jólaprýði heldur áfram. Myndevnið er jólamerkini í 2008, sum ímynda einglar. Astrid Andreasen hevur sniðgivið. Jólaprýðið er úr messingi og lagt við 24 karat gulli. Gyltur snórur er festur í prýðið, so klárt er at heingja upp.

Einglarnir eru uml. 8 cm til støddar, og verða seldir í vakrari eskju - fimm ymiskir í hvørjari.
Jólaprýðið kostar 159,00 kr. settið, íroknað mvg.

## Jólakort

Í sambandi við jólamerkini gevur Posta eisini út fýra jólakort við somu myndevnum. Jólakortini eru dupult og verða tey seld saman við bjálvum.

Jólakortini kosta 25,00 kr settið.